## Sophus væl nøgdur

Sophus Dal-christiansen, venjari, var væl nødgur við avrikið hjá føroyska kvinnulandsliðinum í kappingini í Sheffield. Tó er hann ikki heilt nøgdur við álopsspælið, men hann vil vera við at verjuparturin stóð sera væl, serliga tí at nógv fokus var á verjupartin í fyrireikingini til kappingina. Spurdur um málið varð rokkið til kappingina, svarar Sophus avgjørdur: - Ja! Málið við kappingini var, at fáa eindina at vera kompakta. Samstundis hava leikarnir eisini víst, at teir hava talentið, sum teir hava víst í heimligu kappingini.



## Veðurfastar í Bergen

Føroysku hondbóltskvinnurnar skuldu eftir ætlan koma aftur til Føroya sunnudagin. Veðurlagið her heima kann tó eisini arga ítróttafólk, tí flogfarið við millum øðrum hondbóltskvinnunum ikki fekk sett seg í gjár. Ístaðin noyddust tær saman við hinum ferðafólkunum til Bergen at gista, og so verður vitað, um tað eydnast at seta flogfarið í dag.

# Stór menning í bretskum hondbólti

**Tá ið tað var greitt í 2006, at London skuldi verða vertur fyri OL í 2012, fór eitt miðvíst arbeiðið í gongd um at fáa hondbóltslandslið til menn og til kvinnur upp á beinini**

HONDBÓLTUR
*Ólavur Guttesen*
*ollisweet@hotmail.com*




*Tað ber illa til bert at uppala nýggjar hondbóltsspælarar, so í Onglandi royna tey at finna talent í øðrum ítróttagreinunum eisini, eins og tey royna at finna spælarar við enskum ættarbondum*

Stóra Bretland hevur sum vertstjóð, beinleiðis atgongd til at luttaka í OL kappingini, mótvegis hinum londunum, ið skulu spæla seg til at luttka í kappingini.

### 30 milliónir krónur at arbeiða við

Hondbóltssambandið í Stóra Bretlandi fekk umleið 30 milliónir at arbeiða við, til at byggja hesi tvey landsliðini upp.

Málsetningurin hjá Bretska hondbóltssambandinum er tískil at byggja upp tvey landslið, sum skulu geva hinum luttakandi liðinum, sum luttaka í OL 2012, góða mótstøðu.

Bretska OL nevndin er heilt klár yvir, at hetta er eitt sera stórt stig at taka, og lýsti hesa uppgávu til at vera ein av teimum størstu ítróttarligu avbjóðingunum í samband við OL 2012.

### Stór menning

Tá Challange Trophy kappingin var í 2006 luttók Stóra Bretland í kappingini, og leiktu móti Føroyum. Føroyar vann tann dystin 54-8. Men síðan tá er ein støðug menning farin fram á bretska landsliðinum.

Í vár leiktu Føroyar aftur móti Stóra Bretlandi, og tá vann Stóra Bretland við trimum málum.

Venjarin hjá bretska kvinnulandsliðinum, danin Jesper Holmris, sigur, at menningin gongur rætta vegin, millum annað tí at fleiri av leikarunum ganga á góðum donskum hondbóltsskúlum og leika á sera høgum støði. Bert tríggir av leikarunum ið vóru við í dystinum í 2006, vóru við í vár, tá Føroyar taptu dystin.

### Arbeiðsháttir

Stóra Bretland nýtir tríggjar hættir at finna leikarar. Tann fyrsti er, at royna at menna leikarnar, ið longu eru í Bretlandi, meðan ein annar háttur er, at leita eftir leikarum, ið íðka annan ítrótt, t.d. kurvabólt, ið kanska høvdu klára seg sum hondbóltsleikarar.

Hin hátturin er at leita eftir leikarum, ið longu eru virknir sum hondbóltsleikarar, men sum hava familjusamband (foreldur, ommar og abbar) við Stóra Bretland, og tískil kunnu leika fyri Stóra Bretland. Føroyingar kenna hetta frá fótbóltslandsliðinum.

Tað er ikki bert umboð fyri bretska hondbóltssambandið, ið leita upp fólk. Fólk kunnu sjálvi søkja um at fara til eitt slag av eini upptøkuroynd, og tann vegin finna útav um tey eru skikkaði til at leika hondbólt á rímiliga høgum støði. Higartil hava umleið 3000 verið til upptøku roynd, men bert 36 eru vorðin skikkaði.

Jesper Holmris segði flennandi, at sjálvt føroyingar, ið hava familjusamband til Stóra Bretland, hava møguleika at leika fyri bretsku oynna. Hann legði aftrat, at teimum tørvar eins góðar skjúttar, sum føroyingar hava.

### Veksur spakuliga

Spurdur um hondbóltur er í vøkstri í Bretlandi, svarar Holmris, at henda kappingin er við til at fáa hondbóltin kendan.

Nakað av miðladekningi hevur verið til hesa kapping, og tað ger, at hondbóltur fer at vaksa, tó gongur tað ógvuliga spakuligt.

# Føroyar bankaðu Turkaland

**Tað var ikki nøkur trupul uppgáva føroysku kvinnurnar møttu, tá tær leiktu seinna dystin ímóti Turkalandi. Føroyar vunnu dystin 24-10**

HONDBÓLTUR
*Ólavur Guttesen*
*ollisweet@hotmail.com*

Tapið móti Lettlandi hósdagin tóktiskt at vera fari afturum bak, og tað vóru nakrar væl upplagdar kvinnur, sum fóru inn á vøllin fríggjadagin. Tær høvdu nakað at prógva aftaná tapið móti Lettlandi.

Tær vóru í Onglandi fyri at vinna dystir.

### Erla Elisasen dagsins leikari

Beinanvegin í dystinum vístu føroysku kvinnurnar, at tær høvdu leikligt yvirvág. Turkaland megnaði at halda seg til 2-2, áðrenn Føroyar spakuliga, men við vissu, økti um støðuna so við og við. Tað var eingin ivi um, hvat var tað betra liðið.

Støðan var 10-5 til Føroyar tá liðini bæði fóru til hálvleik.

Føroyska liðið stóð væl á øllum økjum í nærum allan dystin. Verjan var kompakt, og fleiri mál komu uppá skjótálop.

So at siga alt liðið virkaði sum ein heild, men tó er lítil ivi um, at dagsins leikari var málverjin, Erla Eliasen. Hon fekk veruliga sýnt sínar dygdir í málinum. Millum annað kann nevnast, at fyrstu 20 minuttirnar av seinna hálvleiki fingu turkar bert tvey mál, hóast tær høvdu fleiri skot uppá mál, serliga uttanifrá. Tó skal eisini nevnast, at fleiri skot náddu ikki leiðina til Erlu, tí føroysku paradurnar tóku nógv skot.

Sum dysturin leið, var tað bert ein spurningur um, hvussu stórur sigurin fór at vera. Føroyar bankaðu Turkaland 24-10, og sigurin kundi væl verið størri, um føroysku kvinnurnar veruliga vildu tað. Men ein umráðandi dystur var á skránni dagin eftir, og hesin dysturin var kanska longu í tonkunum, áðrenn Turkaland dysturin var av.

### Øðrvísi taktikkur

Sofus Dal Christiansen, venjari hjá føroysku kvinnulandsliðinum, hevði broytt taktiska uppleggið, við at ikki skifta tveir leikarar út millum hvørt álop og hvørja verjustøðu, og tað gav úrslit.

Tí, sum ein leikari segði, forðaðu útskiftningarnar effektivitetin í álpossspælinum í fyrra dystinum.

### FAKTA um dystin

**Føroysku málskjúttarnir:**

| | |
|---|---|
| Simona Petersen, | 9 mál |
| Unn Kragesteen, | 5 mál |
| Durita Christophersen, | 2 mál |
| Elin Staksund, | 2 mál |
| Rebekka Justinusen, | 1 mál |
| Gurið Mortensen, | 1 mál |
| Ása Dam á Neystabø, | 1 mál |
| Ninna K Johansen, | 1 mál |
| Laila Jespersen, | 1 mál |
| Simona Hansen, | 1 mál |

**Útvísingar:**
Føroyar 3
Lettland 4

**Gul kort:**
Føroyar 3
Lettland 2